J.nr.: 2012-1405

# Reglugerð fyri leysar sølubúðir og hissini søluloyvir

## Endamál

1. Endamálið við reglugerðini er at tryggjað nøktandi umstøður til leysar sølubúðir og at virksemið ikki elvir til ampa, m.a. fyri ferðslu. Reglugerðin er eisini galdandi fyri virksemi, uttan sølu fyri eyga. Ásetingar og treytir í hesi regluger eru eisini galdandi fyri Sølutorgið í Vágsbotni. Reglugerðin er gjørd við heimild í § 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur.

## Umsókn

2. Søkjast skal um loyvi til øll sløg av leysum sølu- og veitingarbúðum, so sum pylsu- og matvognum, tjaldbúðum, básum, bingjum, o.a., eftir hetta nevnt, leysar sølubúðir.

3. Heilsu- og umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu viðgerð umsóknir um loyvi til leysa sølubúð og sendir ummæli til løgregluna, sum útskrivar loyvi.

4. Loyvi til leysa sølubúð er galdandi í eitt ár.

5. Umsøkjari syrgir sjálvur fyri, og rindar fyri tekniskar veitinger, so sum el og vatn og skulu tílíkar veitingar leggjast eftir nærri avtalu við kommununa.

6. Um matur verður seldur, skal sølubúðin hava neyðuga góðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sambært galdandi matvørulóg. Um neyðugt, skal umsøkjarin sjálvur fáa til vega handilsloyvi, vinnuligt loyvisbræv o.t.

## Hissini loyvi

7. Søkjast skal um hissini loyvi, og verður loyvið givið undir somu treytum sum loyvi til leysa sølubúð.

8. Hissini loyvi er at skilja sum einstakt loyvi til sølu ella veiting í avmarkað tíðarskeið, so sum til stevnur, samkomur, innan- og uttanduрða tiltøk ella einstakar dagar við eitthvørt endamál.

9. Hissini loyvi kann verða givið sama umsøkjara í mesta lagi 1 til 2 ferðir um árið, við eini longd uppá 1-2 vikur í alt.

## Staðseting

10. Leysar sølubúðir skulu staðsetast eftir ávísing frá Tórshavnar kommunu. Um viðurskiftini tala fyri tí, kunnu frávik frá ásetingunum í einstøkum føri gerast, um tað ikki elvir til ampa, m.a. fyri ferðslu.

11. Søla av fiski skal sum meginregla fara fram á Sølutorginum í Vágsbotni.

12. Yvirlit yvir øki til staðseting av leysum sølubúðum er í fylgiskjali 1. Økini eru tøk hjá øllum teimum, ið hava loyvi at hava slíka sølubúð, og hava øll somu rættindi til støðini.

13. Hvønn dag er tað hann, ið fyrstur er á staðnum, ið hevur rættin at standa á ávísum stað.

14. Um ósemja er um nýtslu av øki kann loyvismyndugleikin gera av trætur.

15. Tórshavnar kommuna tilskilar sær rættin, til eina og hvørja tíð at taka øki úr fylgiskjali 1 og leggja øki afturat, um hetta verður mett neyðugt.

16. Um ætlanin er at seta sølubúðina á privatan veg ella øki, skal loyvi verða fingið til hetta frá ánaranum av vegnum ella økinum.

**Tíðaravmarking**

17. Tíðirnar sølubúðir kunnu standa á økjum eru hesar:

| | | |
|---|---|---|
| **Økisslag I**<br>Kvøld<br>og nátt | hóskvøld<br>fríggjakvøld<br>leygardag<br>sunnudag | kl. 18.00 - 1.00<br>kl. 19.30 - 5.00<br>kl. 18.00 - 5.00<br>kl. 15.00 - 23.30 |
| **Økisslag II**<br>Dag | mánadag-hósdag<br>fríggjadag<br>leygardag | kl. 8.00 - 18.00<br>kl. 8.00 - 20.00<br>kl. 8.00 - 18.00 |

18. Loyvishavarin hevur, uttanfyri hesar tíðir, skyldu at flyta sølubúðina burtur av økinum.

19. Um serligar umstøðurnar tala fyri tí, kann í serstøkum føri víkjast frá omanfyri nevndu tíðum.

**Reinhald**

20. Sølubúðin skal hava nøktandi tal av ruskíløtum til nýtslu hjá viðskiftafólkunum.

21. Økið uttan um sølubúðina skal haldast reint og ruddiligt, meðan opið er. Økið skal beinanveg eftir afturlating gerast reint og ruddast fyri burturkast, sum stavar frá sølubúðini.

**Aðrar treytir**

22. Loyvishavarin skal ikki gera skaða á veg, bygningar, trø, ljóssteyrar, mastrar og annan útbúnað á ella við støðuplássið. Loyvishavarin rindar fyri møguligar skaðar

23. Tórshavnar kommuna kann krevja at støðuplássið ikki verður nýtt, tá serligar umstøður eru, ið forða fyri nýtslu. Plássið skal tá frágangast ruddiligt og reint.

24. Loyvishavarin skal akta boðum frá loyvismyndugleikunum.

**Gjald**

25. Fyri loyvi til leysa sølubúð, verður tikið eitt avgreiðslugjald á kr. 300,-/ár. Hissini loyvi eru ókeypis.

**Eftirlit**

26. Heilsu- og Umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu hevur eftirlit við, at hesar ásetingar verða fylgdar.

27. Tórshavnar kommuna kann til eina og hvørja tíð taka loyvið aftur, um hesar ásetingar ikki verða fylgdar, tvs. sølubúðin elvir til ampa ella verður nýtt til annað endamál, enn loyvið varð latið til.

**Kæra**

28. Avgerðir tiknar eftir hesi reglugerð kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

**Samtykt**: Býráðið 28. juni 2012

# Fylgiskjal 1

| *Økisnr.* | Økisslag | *Mynd av øki* | Kort av øki |
|---|---|---|---|
| ***1***<br>**Sverrisgøta**<br>(við Ebeneser) | **I** |  |  |

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***2***<br>**Niels Finsens gøta**<br>(við býráðssalin) | **I-II** |  |  |
| ***3.1***<br>**Frúutrøð**<br>(við musikkskúlan) | **II** |  |  |

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***3.2*** **Frúutrøð** (við musikkskúlan) | **II** |  |   |
| ***4*** **Eystara bryggja** (Á Bursatanga) | **I** |  |   |

<table>
<tr>
<td>5<br>Eystara bryggja<br>(við Farstøðina)</td>
<td>II</td>
<td>
</td>
<td>
</td>
</tr>
<tr>
<td>6<br>Gundadalsvegur<br>(Badmintonhøllin)</td>
<td>I</td>
<td>
</td>
<td>
</td>
</tr>
</table>

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***7*** **Gundasalsvegur** (p-pláss við skýlið) | **I** |  |  |
| ***8*** **Gundadalsvegur** (við høllina) | **I** |  |  |

<table>
<tr><td>9<br>(Á Nabb)</td><td>I-II</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>10<br>(við svimjihøllina)</td><td>II</td><td></td><td></td></tr>
</table>

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***11*** (Keypsamtøkan) | **II** |  |  |
| ***12*** (við leikvøllin) ***+*** ***13*** (við leikvøllin) | **II** |  |  |